# Teg burdu verið handtikin ...

MADS ANDRIAS FITJU

Vit, ið eru blivin gomul, sum minnast aftur í 20. og 30. hvar sambandið við amtmanni á odda var einaráðandi í Føroyum og hvar allur handil og fiskasøla gekk einans gjøgnum danskar grossistar.

Prísurin var altíð í botni fyri fisk. Tá hesir grossistar høvdu skúmað róman, fingu teir at síggja, hvussu nógv teir vildu av við til føroyingar, soleiðis minnist eg hetta. Eg minnist eisini, tá tað hoyrdist at danski statsministarin Stauning skuldi koma til Føroyar, hvussu fólk tosaðu og settu sína vón til at hann fór at gera okkurt so tað bleiv liviligari. Tað bleiv alt annað enn liviligari í Føroyum aftaná at Stauning hevði verið í Føroyum. Eg haldi fyri vist, at Stauning var íbirtarin til tann føroyska javnaðarflokkin, sum ikki hevur roynst nakað betur enn sambandið. Liviligari hevur hann ikki gjørt tað í Føroyum. Tá so lítið og einki fekst fyri fiskin hvar skuldi so pengarnir koma frá. Eg kendi nógv, sum høvdu havt við skip at gera, sum blivu fláaði inn á skinnið og húsvill, eg visti eisini um børn, sum gingu grátandi svong. Tá so fólk blivu rakt av tuberklum, sá svart út. Okkara kendi málari S. J. Mikines bleiv so rørdur av øllum sum doyðu, at hann tók pensilin í hond og málaði tann kenda málningin »Gravarferð«. Men hvørki sambandi ella javnaðarflokkurin fingu eyguni upp hvar feilurin lá. Tað skuldi kom at vísa seg í 1940 tá vit sluppu av við danir.

Vit eru nú í 1939, vit komu heim í oktober mánaði frá Grønlandi og fiskiskapurin hevði verið hampuliga góður, men tá landað bleiv, fingu vit ikki meira enn 33 oyru fyri kilo. Tá liðugt var at landa fiskin, bleiv skipið fortøjað og alt bar á tað borðið, at skipið fór undir hamarin, men í 1940 kom ein íslendskur útgerðamaður, hann gjørdi skipið út um várið við toskagørnum og um heystið gjørdi hann aftur skipið út at sigla við ísfiski til Bretland. Skip og manning høvdu góðan sáttmála og samarbeiðið var sera gott og vardi alt kríggið. Vit vóru í Íslandi tá vit hoyrdu at týskurin hevði spasera óhindraður inn í Danmark. Og somuleiðis var tað positiva hent, at bretar høvdu ávarað føroysk skip um ikki at flagga við donskum flaggi. Amtmaðurin stríddist saman við sambandinum ímóti, men endin varð, at amtmaður og sambandi máttu bíta í ta súra eplið. Og soleiðis bleiv tað føroyska flaggið góðkent av Bretlandi, soleiðis minnist eg tað.

Tjóðskaparrørslan var ógvuliga sterk undir kríggnum, tað kom týðiliga fram, at fólkið hevði innstilla seg til at klára seg sjálvt. Vit kendu heldur ikki til nakað annað. Nú vóru vit fyri einaferð skuld sloppin úr tí donsku spennitroyggjuni og teimum donsku grossistunum. Alt kom at síggja ljósari út aftaná týskurin hevði hersett Danmark í 1940. Bara spell at vit føroyingar ikki tóku landið aftur í 1940, sum danir høvdu roynt í gjøgnum nógv hundrað ár at tiltuska sær. Amtmaðurin Hilbert átti at verið handtikið og frásettur í 1940. Rættast hevði verið at havt hann sitandi í húsarrest, tí hann var ein meinbogi fyri okkara merki. So skuldi vit latið umheimin vitað, at Føroyar var ein sjálvstýrandi republikk.

Kríggið var av í 1945 og Føroyar slopnar burtur úr tí hungurstíð, sum ta danska kongaríkið má bera alla ábyrgd av. Nú galt tað um at vera varin, so vit ikki aftur endaðu í tí donsku spennitroyggjuni, men hvat gera okkara løgtingsmenn - kríggið var ikki meira enn avhasað tá nógvir løgtingsmenn fóru bløðkandi til Danmarkar. Hesir løgtingsmenn gingu sum býttlingar og mólu í Keypmannahavn. Tað hevði verið nógv betri, um teir sótu á reyvini heima. Fíggjarliga vóru vit endiliga blivnir væl fyri, men so skjótt hesir býttlingar seta fótin á danska jørð hava teir fingið okkum í somu støðu sum í 20. og 30. Aftaná langar og drúgvar samráðingar høvdu danir gjørt sítt egna uppskot sum alt løgtingið tók undir við. Dagurin var eisini settur til 14. september 1946. Tað galt loysing ella danska uppskotið. Nú hoyrdist at okkara maður Jóannes Patursson var deyður 2. august 1946. Tað kom okkum loysingarfóki illa við, tí longu tá var álitið á hini í flokkinum fokið, men tross alt vann loysingin við 5.638 atkvøðum móti danska uppskotinum sum fekk 5.454 atkvøður. Kort aftaná valið hoyrdi eg danska statsministarin Knud Kristensen hvar hann ynskti okkum tillukku og vónaði hann, at vit komu at skiljast sum vinir. Eg trúgvi ikki at nakar í loysingarflokkinum hevði nakað ímóti tí, men vit vildu ikki koma aftur í somu støðu sum í 20. og 30. har vit vóru eitt tilafturskomið hjáland í tí danska ríkinum.

Nú rotta Kristian Djurhuus, Petur Mohr Dam og aðrir suðuroyingar seg saman til at fáa danskt krígsskip til Føroyar til at niðurberja okkum sum lógliga høvdu valt loysing. Eisini fingu teir ta donsku regeringina í sín part og tann danska, hálvdeyða kong Kristian. Ein stór skomm fyri ta danska kongahúsið, at stinga okkum í ryggin, ið høvdu valt fríheitina. Kongurin hevði ongan rætt til at blanda seg í okkara sakir og serliga ikki aftaná at loysingin hevði vunnið valið. Nú vóru vit leysir av tí danska kongaríkinum. Ein so elendig tingmanning, sum sat á løgtinginum aftaná 14. september haldi eg ikki fanst verri í allari verðini. Har var bara eitt ljós, og tað var Jákup í Jákupsstovu. Hann visti, at nú galt samanhald. Hinir allir vóru stórir landasvíkjarar. At Jákup ikki verður mintur hvønn 14. september, er besta prógvið um, hvussu langt við síðuna av vit eru. Somuleiðis at løgtingið og landsstýrið hevur útihýst okkara kæra merki, størsta dag hjá okkum, sum enn eru á lívi, 14. september. Skammi tykkum, at vera so stórir landasvíkjarar, hvat rakar tað okkum, um, nakrir danskir prinsar og ein donsk dronning hava føðingardag? Somuleiðis nær og hvar danir halda sín grundlógardag. Einki av hesum viðkemur mær. Hatta misbrúka okkara løgting og landsstýri okkara merki til, syrgiligt! Trýss ár eru farin afturum síðani vit valdu fríheitina, men enn eru vit lítið frægari enn í 1939.

Hvar er okkara pass? Løgting og landsstýri hava roynt at lagt allar meinbogar fyri at Føroyar ikki skulu blíva kendar úti í verðini. Passið skuldi fylgt við merkinum, sjálvandi. Dánjal J. Thomsen spyr í Dimmu um føroyingar hava sagt seg úr tí danska ríkinum, ja, tað gjørdu vit tann 14. september 1946. At Føroyar ikki bleiv skrásett sum republikk líka aftaná fólkaatkvøðuna í 1946, hevur kostað okkum dýrt. Nógv órudduligt fór fram aftaná fólkaatkvøðuna í 1946 og serliga tá Andrass Samuelsen bleiv kroystur niður yvir heysarnar á okkum sum løgmann. Tað mest náttúrliga hevði verið at fólkið hevði valt ein forseta og ikki løgmann. Løgting og landsstýrið hevur í langa tíð møsnað um visiónir, men einki er gjørt fyri at bremsa teimum mongu donsku drepandi forðingunum. Tað sum hendan samgongan hevur havt at bjóða okkum, er at vit fara í grøvina sum tilafturskomnir danskir kolonistar. Tey, ið hava roynt at sabotera fólkaatkvøðuna frá 1946 burdu fyri langt síðani verið handtikin og drigin fyri ein dómstól.

# Viðmerking til góðan morgun Føroyar í Útvarpi Føroya mikudagin, 29. november 2006

ÍSAK MIKLADAL
aðalskrivari í FSF



Í sambandi við spurningin sum varð sendur GMF um alment innlit í FSF og sum var svaraður ógvuliga greitt av Sigmundi Poulsen, løgfrøðingi, sat føroya fólk eftir við tí fatan, bæði av innsenda spurninginum og viðgerðini av spurninginum í seini heild at FSF fær millióna upphæddir frá tí almenna, men hetta er ikki veruleiki.

Sambært fíggjarætlanini hjá FSF fyri 2006 og sum varð løgd fram á aðalfundi FSF's í februar, er samlaða inntøkan hjá FSF í ár mett til umleið 18 mill. kr. og av hesum er samlaði stuðulin frá landinum 980 túsund kr. og svarar hetta til umleið 5,5% og er hetta á leið tað sama sum hevur verið galdandi seinastu árini.

Við tað at sendingin GMF ikki gjørdi vart við hetta beinanvegin, hóast biðið varð um tað, eru hesar reglur skrivaðar.

Takk til GMF manningina annars fyri góða sending.

Við ítróttakvøðu

# Svínoyggin eitt alternativ

FRANK DAVIDSEN



Orðaskifti um ein alternativan flogvøll sum hevur tikið seg upp seinastu tíðina hevur lítið við veruleikan at gera, tá tað snýr seg um at niðurgera verandi flogvøll.

Sum vit øll eru greið yvir, so eru Føroyar eitt oyggjaland við firðum og sundum og við høgum fjøllum, sum ger at óansæð hvar tú leggur ein annan flogvøll, so slepst ikki undan meira og minni ógvusligum turbulensi alla staðni.

Taka vit tildømis Skorðhæddina og Glyvursnes undir einum so slepst ikki undan ógvusligum turbulensi, tí við innflúgving skal flúgvast rúma tíð yvir fjøll og firðir við turbulensi, ið er líka ringur ella verri enn Mykinesfjørður. At tað so í fullum álvara verður tosað um, at eitt samfelag við 48.000 íbúgvum skal hava ein alternativan flogvøll við øllum ið hartil hoyrir, eins og eina milliarda íløgu, ja tað má sigast at vera langt úti.

Tá ein so hugsar um samferðslunetið, sum ikki hevur sín líka í heiminum hvat kostnaði viðvíkir og vit harafturat kunna ferðast úr einum enda í annan, har 85% av fólkinum býr, ja ta er eingin ivi um at Føroyar koma í Guinness metbókina, sum tað landið ið byggir flogvallir alt eftir hvussu vindurin blæsir, og tá haldi eg, at Svínoyggin er nógv tað besta alternativið til ein framtíðar flogvøll.

# Jóhann Mortensen avsannar ikki, at samband er millum Dan R. Petersen og Útvarpið

JAN HØJGAARD



Jóhann Mortensen avsannar ikki, at samband er millum ÙF og Dan R. Petersen. Hann sigur, at Dan R. Petersen, ikki hevur samband til tíðindadeildina. Tað hevði verði gott, um Jóhann Mortensen, so hevði kundi sagt okkum hvat fyri samband var millum ÚF og Dan R. Petersen. Tí fari eg at spyrja Jóhann Mortensen, hvat fyri samband er ella hevur verið millum ÙF og Dan R. Petersen. Also, hevur Dan R. Petersen havt nakað við ÙF at gera, eitt nú nevndar-arbeiði ella so?

Eini ráð til ÚF, tit eiga at gera sum SVF. Fyri ca 3 árum síðani, var herviligur ágangur móti sjómonnum. Tá spurdi SVF, ein av manningini av einum trolara um viðurskiftini umborð. Hesin maðurin segði síðani hvussu støðan var umborð. Tað var nakað heilt annað enn tað, "Prognombólkurin Móti Fiskimonnum" , førdi fram.

Tað skuldi verði rættiliga einfalt Jóhann Mortensen.

